NORÐOYA SPARIKASSI

# Kundaráðgevi til Norðoya Sparikassa í Tórshavn



Søkt verður eftir kundaráðgeva til Norðoya Sparikassa í Tórshavn.

**Uppgávur**
Sum kundaráðgevi gerst tú ein týðandi partur av einum øðrvísi peningastovnskonsepti, har stórur dentur verður lagdur á, at kundar okkara fáa eina góða uppliving.

Tú veitir ráðgeving innan øki fígging, pensjón og íløgur, samstundis sum tú gerst ein partur av einum vælvirkandi toymi av ráðgevum.

**Persónligir eginleikar**
Ert tú jalig/ur, hevur góð samstarvsevni, sjálvsálit, eins og tær dámar at arbeiða sjálvstøðugt, er Norðoya Sparikassi møguliga arbeiðsplássið fyri teg.

**Fakligir førleikar**
Peningastovnsútbúgving ella onnur viðkomandi útbúgving er ein fyrimunur.

**Upplýsingar um starvið**
Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til:

Finnur Klein, deildarleiðara
Telefon: 47 5058
Fartelefon: 77 5058
Teldupostur: finnur@ns.fo

**Umsóknarfreist**
Umsókn saman við próvskjølum, viðmælum og C.V. skal vera sparikassanum í hendi í seinasta lagi hósdagin 30. september 2010 og skal sendast til:

Norðoya Sparikassi
Ósávegur 1
Postsmoga 149
FO-710 Klaksvík

att: Eyðun Nolsøe, starvsfólkaleiðari

Kann eisini sendast sum teldupostur til:
eydunn@ns.fo

GRAFIA 457072

*Norðoya Sparikassi Ósávegur 1 Postboks 149 FO-710 Klaksvík Tel. 47 5000 Fax 47 6000 ns@ns.fo www.ns.fo*

## Bilførarar

Kommunala Brennistøðin søkir eftir tveimum bilførarum, ið hava stóra koyrikortið, at koyra nýggjan rottangabil hjá Tórshavnar kommunu.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Havnar Arbeiðsmannafelag og Havnar Arbeiðsgevarafelag, lønarflokkur 3d. Størvini eru fastløn/-mánaðarlønt. Fasta arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna, men tú skal vera til reiðar at átaka tær meirarbeiði, sum verður útgoldið sum yvirtíð. Tú skal kunna tola møguligar broytingar í setanarviðurskiftunum.

Størvini verða sett umleið 1. oktober ella skjótast til ber.

**Meiri fæst at vita**
við at venda sær til Regin Haraldsen, arbeiðsleiðara, telefon 302038, ella Bárð Michelsen, stovnsleiðara, telefon 302035.

**Umsókn**
saman við viðmælum, avrit av koyrikorti og upplýsing um royndir, skal vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi mánadagin 13. september 2010 kl. 12. Merkið umsóknina »Bilførari til rottangatænastuna«.

## Pedagogur og køksfólk

Tórshavnar kommuna søkir vegna Dagstovnin á Hamrinum eftir einum pedagogi til vøggustovu at arbeiða 25-30 tímar um vikuna at byrja 1. oktober 2010 ella eftir nærri avtalu. Eisini verður søkt eftir einum køksfólki at arbeiða 15 tímar um vikuna at byrja 15. oktober 2010 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Pedagogurin verður settur sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Starvið sum køksfólk verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndum skal vera hjá Dagstovninum á Hamrinum, Glyvursvegur, 160 Argir, í seinasta lagi mánadagin 13. september 2010.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Maibritt Simonsen, stovnsleið, á telefon 225784.

## Køksfólk

Tórshavnar Kommuna søkir vegna Dagstovnin í Øksnagerði eftir einum køksfólki at arbeiða 16 tímar um vikuna at byrja skjótast gjørligt. Tann, ið settur verður, kemur at hava ábyrgd av innkeypi av vørum, millummála og uppvaskinum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Dagstovninum í hjá Øksnagerði, Øksnagerð 1, 100 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 6. september 2010.

**Meiri fæst at vita**
Við at venda sær til Gunrid á Plógv, leiðara, á telefon 302260 ella 219959.

Les meira um størvini á www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA